# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Forsetin vil hava meiri pengar til sín miseydnaða politikk í Irak, men umsóknin fær ikki mína atkvøðu*

*(Hillary Clinton)*

# KALIFORNIA BRENNUR



**Tvey fólk hava latið lív, 350.000 hús standa tóm, 1.500 hús eru brunnin í grund, og vegir og gøtur eru full av flýggjandi fólki. Tað er støðan fjórða dagin við oyðandi skógareldum í Kalifornia. 6.000 sløkkiliðsmenn eru givnir við royndunum at basa eldinum, tí vindurin ger sløkkiarbeiðið nyttuleyst. Nú røður bara um at bjarga tí, sum bjargast kann.**

## Aung fær Nobel-stuðul

Seks kvinnur, sum hava fingið friðarheiðursløn Nobels, mæla hernaðarstýrinum í Burma til at lata Aung San Suu Kyi leysa

Í einum opnum brævi í bretska blaðnum The Guardian siga tær seks kvinnurnar seg vera vónbrotnar av, at hernaðarstýrið í Burma sýtir fyri at gera eftir áheitanini frá ST um at lata andstøðuleiðaran Aung San Suu Kyi leysa. Eins og tær seks hevur hon eisini fingið friðarheiðursløn Nobels.

- Tað burmesiska stýrið eigur ikki at fáa loyvi til at halda fram við sínum grovu brotum á mannarættindini. At Aung San Suu Kyi verður hildin í húsavarðhaldi er ein sjónligt tekin um harðrendu framferðina hjá stýrinum. Men tað er heldur ikki meiri enn tað ovasta av ísfjallinum, skriva tær seks kvinnurnar í The Guardian.

Kvinnurnar, sum hava skrivað undir tað opna brævið, eru Jody Williams, Shirin Ebadi, Wangari Maathai, Rigoberta Menchú, Betty Williams og Mairead Corrigan Maguire. Tær leggja afturat, at fyrrverandi amerikanski uttanríkisráðharrin Madeleine Albright er samd við teimum.

# Uppreistur ímóti iranska forsetanum

**Iranski forsetin, Mahmoud Ahmadinejad, noyddist at bróta eina uttanlandsvitjan av, tí tingmenn vilja ikki góðtaka framferð hansara**

Mahmoud Ahmadinejad situr kanska ikki so tryggur í iranska forsetaembætinum, sum hansara almenna framferð tykist vísa.

Í gjár noyddist hann at bróta eina vitjan í grannalandinum Armenia av og at skunda sær aftur til Teheran. Almenna frágreiðingin hjá iransku myndugleikunum var, at okkurt óvæntað var komið í vegin, men diplomatar í Teheran søgdu, at forsetin mátti fara heimaftur, tí tjóðartingið hevði gjørt uppreistur ímóti honum.

Orsøkin til misnøgdina er avgerðin hjá forsetanum at koyra Ali Lariyani frá sum samráðingarmann við umheimin um landsins kjarnorkuætlanir og at seta Said Yalali í hansara stað. Politiskir eygleiðarar siga, at avgerðin hjá forsetanum hevur til endamáls at vísa umheiminum, at tað er forsetin, sum stýrir samráðingunum, og at Iran ætlar sær ikki at gera nakra neyðsemju við Vesturheimin.




*Mahmoud Ahmadinejad hevur fingið meirilutan í iranska tjóðartinginum ímóti sær*

Men sambært spanska blaðnum El Pais fær avgerðin hjá Ahmadinejad ikki undirtøku í tjóðartinginum. 180 av teimum 295 tinglimunum hava skrivað undir eina fráboðan um, at teir styðja ikki avgerð forsetans at koyra Ali Laryani frá sum samráðingarmann.

## STUTT SAGT

### Bush ávarar um rakett

Amerikanski forsetin, George W. Bush, roynir av øllum alvi at sannføra russar um, at teir eiga at góðtaka amerikonsku rakettverjuætlanina, tí hon hóttir á ongan hátt Russland, sigur hann. Tann seinasti trumfurin hjá Bush er, at sambært álítandi keldum eru iranar førir fyri at gera eina nýggja rakett, sum ber so langt, at hon kann røkka málum um alt Evropa og partar av USA. Bush sigur, at tann fyrsta rakettin verður kanska liðug í 2015, og tí hevur tað eftir hansara tykki skund at fáa rakettverjuna at virka til ta tíð.

### Banna skrúðgongu

Í Kekkia ætla nýnasistar at ganga skrúðgongu ígjøgnum tann jødiska búarpartin í høvuðsstaðnum Prag í næsta mánað, men borgarstjórin í býnum ætlar sær at forða ætlanini. Býráðið í Prag hevur samtykt at banna skrúðgonguni, men ein dómstólur í býnum ógildaði samtyktina, tí hon stríðir ímóti galdandi lóg. Borgarstjórin ætlar sær kortini ikki at gevast so, og hann hevur lovað at gera sítt til, at skrúðgongan verður av ongum. Nýnasistarnir ætla at ganga skrúðgongu tann 10. november til minnis um ta sokallaðu Krystallnáttina tann 9. november í 1938.

### Pólland viðgekk svik

Tá fiskimálaráðharrarnir í ES-londunum í gjár tingaðust um fiskiskapin í Eystrasalti næsta ár, viðgingu polsku myndugleikarnir, at polskir trolarar hava veitt munandi meiri tosk í eystara parti av Eystrasalti, enn landið hevur givið upp. Tað loysti seg hjá pólendingum at viðganga svikið, tí teirra kvota næsta ár verður bara fimm prosent minni enn í ár. Hinvegin minkar toskakvotan hjá eitt nú dønum munandi meiri, men teir fáa fleiri fiskidagar ístaðin fyri.